**Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð.**
**Bygdarráðsfundur tann 23. november 2015, kl. $19^{00}$.**

| | |
|---|---|
| **Bygdarráðslimir á fundi:** | Pauli T. Petersen, Karl A. Olsen, Jógvan Emil Nielsen, Malan Stórá, Durita á Heygum, Herit Magnussen og John Zachariassen |
| **Skrivari:** | Maud Poulsen |

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 154**
Tilmæli frá Havnarnevndini um áheitan frá Gunnari Skúvadal á Vestmanna Kommunu um at gera eina rampu inni á Fjørð, soleiðis at møguligt verður at taka bátar upp.
J.nr. 08.03.00-G01-2-15.

Havnarnevndin viðgjørdi á fundi tann 16. november 2015 áheitan frá Gunnari Skúvadal á Vestmanna Kommunu um at gera eina rampu inni á Fjørð, soleiðis at møguligt verður at taka bátar upp. Víst verður til tilfar í málinum, j.nr. 08.03.00-G01-2-15.

Havnarnevndin tekur undir við ætlanini við treytum. Treytin er at umsøkjarin sjálvur fíggjar rampuna. Tað leigugjaldið, sum umsøkjarnin skal gjalda, kann mótroknað.

Havnarnevndin mælur til, at tað samstundis sum rampan verður gjørd, skipar kommunan fyri plássum til at seta bátar á. Kommunan skal taka leigugjald frá teimum, ið hava tørv á hesum plássunum.
Havnarnevndin samtykti eisini, at umsitingin kannar, um tað er møguligt at rampan verður har ferjulegan er/var.

**Viðv. 154**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 20.00

Sign.:

Pauli T. Petersen Karl A. Olsen Hilbert Elisson Herit Magnussen

Durita á Heygum Malan Stórá John Zachariassen